Komið
23 FEB. 2011
Akstovan

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

AVRIT

| Rundskriv | Dato 21. februar 2011 |
| --- | --- |
| Til Aðalráðini | J. nr. 2100-0132/2011\1 |
| Heiti Rundskriv um merking av akførum hjá landinum | |

**§ 1.** Øll akfør hjá landinum skulu verða týðuliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir og/ella búmerki stovnsins.

**§ 2.** Um so er, at stovnsnavnið ikki er partur av einum búmerki, skulu bókstavirnir í minsta lagi verða 7 cm. høgir og 1,3 cm. tjúkkir.

**§ 3.** Búmerkir skulu í minsta lagi verða 450 $cm^2$ í vídd, uttan mun til formin á tí einstaka búmerkinum.

**§ 4.** Liturin á bókstavunum og/ella búmerkinum skal veljast alt eftir hvønn lit akfarið annars hevur, soleiðis at týðuligur mótsetningur er millum litin á akfarinum og litin á bókstavunum og/ella búmerkinum.

**§ 5.** Akfarið skal merkjast á báðum síðum.

**§ 6.** Akstovan hevur eftirlit við, at reglurnar í §§ 1-5 verða hildnar.

**§ 7.** Akstovan kann í heilt serligum førum loyva undantøkum frá merking av akførum hjá landinum í §§ 1-5. Talan kann t.d. verða um eftirlits- og innheintingaruppgávur hjá almennum stovnum.

**§ 8.** Tað er ikki loyvt at nýta akfør hjá landinum til privata nýtslu.

**§ 9.** Hesar reglur koma í gildi 1. mars 2011. Samstundis fer úr gildi umfarsskriv um merking av akførum hjá landinum frá 2. juli 1993.

**Fíggjarmálaráðið, 21. februar 2011**

**Jóannes Eidesgaard**
landsstýrismaður

**/Petur Alberg Lamhauge**
fíggjarmálastjóri

Uppskot til merkingar av tænastuakførum.




